gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Ein n‡ggj politisk stø›a í anna›kvøld

Nú tykist heilt greitt, at fjór›a samrá›ingarumfar ver›ur trupult. Sumulei›is tykist rættiliga greitt, at landsst‡ri› røkkur neyvan á mál vi› verandi samrá›ingarætlan. So kunnu vit altí› keglast um, hvør hevur skyldina ella ikki. Men gongdin seinastu dagarnar bendir á, at hvørki stjórn ella landsst‡ri› s‡na diplomatiskt snildi. Eisini kunnu fólk loyva sær at halda, at landsst‡rinum vantar ein royndan embætismann - rá›geva - í hesum taktiska spæli.

Líta vit afturá, virkar framfer›arhátturin hjá stjórnini ikki serliga málrætta›ur. Landsst‡ri› tosa›i fyrstufer› vi› forsætisrá›harran um samrá›ingar, eftir bankasemjuna í juni 1998. Tá sta›festi felagsfrágrei›ingin rættin hjá landsst‡rinum at samrá›a seg til eitt føroyskt fullveldi. Men stjórnin gó›tók ikki seinri sama summar, at embætismenn í felag kanna›u vi›urskifti Føroyar og Danmarkar ímillum og útvega›u tilfar at samrá›ast út frá.

Ísta›in vildi stjórnin hava, at føroyingar komu vi› einum uppskoti at samrást um. Tá fór alt arbei›i› vi› Hvítubók ígongd, og seinri var› so samrá›ingaruppkasti› or›a›. Í hesum sambandi kann vi›merkjast, at andin í samrá›ingaruppkastinum leg›i kanska ikki upp til positivar og konstruktivar samrá›ingar. Danska stjórnin gó›tók heldur ikki endamáli› í samrá›ingaruppkastinum. Harafturat hevur hon nú lati› embætismenn kanna› ymisk løgfrø›ilig vi›urskifti hjá føroyingum í Danmark, um Føroyar gerast fullveldisríki. Ta› merkir, at stjórnin nú ger arbei›i›, sum føroyingar frammanundan hava gjørt!!!

Harafturat hevur so spurningurin um sjálvsavger›arrætt føroyinga tiki› seg upp. Forsætisrá›harrin slær fast í skrivi seinastu dagarnar, at Danmark hevur ikki gó›tiki› Føroyar sum eittt sjálvstø›ugt "folkeretssubjekt". Sum merkir, at stjórnin gó›tekur ikki Føroyar sum eina tjó› í fókarættarligum høpi. Men løgma›ur hevur óiva› provokera› forsætisrá›harran, tá hann í einum ø›rum brævi nú um dagarnar skriva›i, at samrá›ingarnar vór›u grunda›ar á "sjálvsavger›arrætin hjá Føroya fólki". Ta› er ein annar problematikkur, sum vit ikki skulu nerta vi› ídag.

Landsst‡ri› hevur ein grei›an setning: at stovna eitt fullveldisríki. Eitt anna› er so, at ivamál er, um meiriluti er fyri tí. Hinvegin hava vit eina danska stjórn, sum er ímóti hesi ætlan. Hon hevur sagt seg sinna›a at samrá›ast, men líkt er til, at nógvar snildir ver›a brúktar at benda tilgongdin henda og handa veg. Gongdin seinastu dagarnar er greitt tekin um, at hon roynir at forhála samrá›ingarnar. Samrá›ingarnar ímorgin ver›a truplar. Og í anna›kvøld "fyriliggur" óiva› ein n‡ggj politisk stø›a!

NØVN Í VIKUNI

60 ár

15. oktober fylti Jógvan Kallsoy Mørkøre á Ei›i 60 ár.

Jógvan í Lø›uni, sum hann á Ei›i ver›ur nevndur, er sonur Óluvu og Jóannes Mørkøre. Jógvan er giftur vi› Katrini, dóttir tónlistamannin Jens Guttesen úr Havn, og tey eiga tríggjar synir, Jóannes, Janus og Ólav, sum eisini fylti ár tann 15. oktober. Hann er føddur á 45 ára degnum hjá pápanum.

Jógvan í Lø›uni er útbúgvin radiomekanikari. Hann lærdi í Klaksvík og var fyrsti lærlingur hjá Marstein.

Undantiki› nakrar túrar vi› Karin K hevur Jógvan arbeitt á Lorenstø›ini á Ei›i. Hann byrja›i í starvi hjá Farvandsvæsenet, sum ta› eitur, tann 17. december 1962 og hevur sostatt veri› í sama starvi í næstan 38 ár.

Tá hann hev›i veri› í starvinum í 25 ár, fekk hann »fortjentsmedalju« og gjørdist samstundis riddari av Dannebrog.

Ta›, sum almenningurin í Føroyum mest kennir Jógvan fyri, er hansara luttøka í kommunalpolitikki.

Hann var› fyrstu fer› valdur í bygdarrá›i› á Ei›i í á valinum í1966 og hevur siti› har sí›an vi› undantaki av valskei›inum 1976-1980. Ta› skei›i› var hann tó kommunuskrivari, og hevur sostatt veri› í kommunalpolitikki í meira enn 30 ár.

Í 1972 gjørdist hann st‡rislimur í Føroya Kommunufelag, har hann í skiftandi skei›um hevur veri› forma›ur, og er ta› í løtuni.



50 ár

Klæmint Weihe, stjóri í elfelagnum SEV, fylti 50 í gjár. Klæmint er sørvingur, men hann hevur megin partin av ævini bú› í Havn. Sum SEV stjóri er hann ein av mest útskelda›u persónum í landinum, men samstundis, so syrgir hann fyri, at streymur er hvørja fer› tú tr‡stir á eina kontakt og reglusemi í tænastuni hjá SEV er gott og álítandi hjá allarflestu føroyingum. Mi›vísa og dugnaliga arbei›i hjá Klæmint Weihe seinastu mongu árini hevur bori› frukt.

Me›an Klæmint hevur siti› sum stjóri á SEV, eru stórhendingar farnar fram í fyritøkuni, og hon hevur fylgt vi› tí›ini.

Uttan at taka dagar í millum hvat er rætt og hvat er skeivt, so stendur ta› fast, at SEV um stutta tí› sjálvt er ment at útvinna størra partin av orkuni úr vatnorku, sum er varandi orka og sum ikki dálkar umhvørvi. At hendan varandi orkan hevur ávirka› umhvørvi› og skapt n‡tt umhvørvi í Føroyum, er ein onnur søga.

Klæmint er ungur enn og spennandi ver›ur, hvat hann fer at fáa av skafti næstu árini. Vindmyllur standa tættar allasta›ni á evropeiska meginlandinum, og fíggjarligur vinningur fæst burturúr. Í Føroyum fer tráa vesturættin fúkandi fram vi› landinum dag og dagliga uttan at leggja eina krónu eftir seg av t‡dningi. Kanska hetta ver›ur næsti setningurin hjá Klæminti.

Tillukku vi› degnum.

je



Stillar ikki upp aftur

41 ára gamli bygdarrá›sforma›urin í Gøtu, Jógvan Gregersen, hevur avgjørt ikki at stilla upp aftur til bygdarrá›svali›. Hann hevur ikki stundir í løtuni at takast vi› kommunupolitikk. Eftir n‡ggju kommunulógini er ta› ikki skylda at stilla upp aftur, um ein hevur siti› eitt skei›. Jógvan í gerandisdegnum virkislei›ari á Fiskavirkinum í Gøtu og hann er eisini bóndi. Í frítí›ini er hann virkin innan fótbólt og GÍ sjálvsagt.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Hjørdis Árnadóttir hjordis@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
bokhald@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lystorg@sosialurin.fo
innsent@sosialurin.fo
tiltok@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Uttanlandsnevndin uttan heimildir

Uttanlandsnevndin fær ikki sett fund á Christiansborg í samband vi› samrá›ingarnar, men forma›urin roknar kortini vi›, at nevndin ver›ur kunna› um samrá›ingargongdina í Forsætisrá›num

FULLVELDIS-SAMRÁ‹INGAR
John Johannesen og Magnus Dam
Keypmannahavn

F‡ra av teimum sjey limunum í uttanlandsnevndini nokta at møta á fundi í Danmark í samband vi› samrá›ingarnar í Forsætisrá›num í dag. Teir f‡ra umbo›a allir andstø›una, sum heldur ta› vera skeivt av nevndini at fara vi› landsst‡rinum til Danmarkar.

Forma›urin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, hevur bo›a› til fundar á Christiansborg eins og seinast, samrá›ingar vóru millum landsst‡ri› og stjórnina. Men andstø›an, sum hevur meiriluta í nevndini bo›a›i fyrradagin frá, at hon ikki kemur á fund.

Hergeir Nielsen fær tí ikki sett fundin, sum helst ver›ur av ongum. Men hóast hetta eru teir tríggir samgongulimirnir í nevndini staddir í Keypmannahavn.

- Løgma›ur hevur sagt, at nevndin er vælkomin at vera til sta›ar í Keypmannahavn. Fundarbo›ini hjá mær standa vi›, og ver›ur fundurin ikki manna›ur, ver›ur hann ikki settur. Men vit hava fingi› høli á Christiansborg, og eg ivist ikki í, at samskifti› fer at ver›a millum landss‡ri› og stjórnina undir samrá›ingunum, sigur Hergeir Nielsen.

Ta›, at forma›urin ikki fær sett fundin í nevndini, ber í sær, at sjálv nevndin ikki fær givi› landsst‡rinum nøkur rá› í samband vi› samrá›ingarnar. Men persónliga kennir Hergeir Nielsen seg ikki meira skerdan, nú meira enn helmingurin av nevndarlimunum hevur gjørt av ikki at møta á fundi.

- Men formalia mótvegis løgtinginum skulu ver›a í lagi, og tí tekur nevndin onga stø›u ella avger›. Men vit ver›a so til sta›ar, sigur hann.

At Hergeir Nielsen og hini bæ›i samgonguumbo›ini ver›a til sta›ar í teirra eginleika sum løgtingsumbo›, má forma›urin í uttanlandsnevndini bara taka til eftirtektar.

Sjálvur vónar forma›urin í uttanlandsnevndini, at stø›an eftir fundin í dag ver›ur so miki› grei›, at føroyingar vita nágreiniliga, hvar vit standa í spurninginum um framtí›arstø›u Føroya.

- Partarnir fara neyvan ni›ur í smálutirnar á fundinum, men eg vóni, at vit fáa gjørt stø›una upp, so vit vita, hvar vit hava danir og danir vita júst, hvør okkara stø›u er, sigur Hergeir Nielsen.



Hergeir Nielsen fær ikki stu›ul frá andstø›ulei›unum, Edmundi Joensen og Jóannesi Eidesgaard í sambandi vi› samrá›ingarnar vi› donsku stjórnina í dag

Hevur tú kannað rentuna?

Seinastu 12 mánaðirnar hevur íløgufelagið Altjóða Partabrøv hjá Kaupthing givið 54% í rentu og seinastu trý árini 113%. Nú kanst tú, sjálvt við fáum túsund krónum, gera íløgur í virðisbrøv. Støkk inn á gólvið hjá okkum ella einari av deildunum hjá Føroya Sparikassa og fá meiri at vita.

Rentan er roknað í tíðarskeiðunum fram til 1. september 2000. Søguligur vinningur er ikki trygd fyri framtíðar vinningi.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com